VÁGA KOMMUNA

# Reinførispolitikkur fyri Vága kommunu.

**Samtykt 20. Nov 2013**

VÁGA KOMMUNA

# Reinførispolitikkur fyri Vága  kommunu.

**Krøv um reingering á barnastovnum**
Við støði í reinførisleiðbeiningum fyri reingering av almennum stovnum, eiga krøv at verða sett til reingeringarætlan, ið fevna um einstøku økini, útgerð, mannagongd og reingeringarevni. Rein-gerðingarætlan skal vera til skjals, og dagliga reingeringin skal verða skjalfest.

**Generelt**
Veggir og innbúgv elva vanliga ikki til nakran smittuvanda, uttan so at dálkað verður við smittandi  biologiskum evni. Tí er ikki neyðugt at vaska lodrættar flatur dagliga. Kravi er, at sjónligt dust ella dálking ikki má koma fyri. Annars eiga øll rúm í barnastovnum at verða vaska upp og niður eina ferð um ári, og umfatar hetta eisini veggir og loft. Um sjónlig dálking er við skarni, spýggju ella øðrum biologiskum evni, skal hetta turkast av við fuktaðum einnýtis-lappa/klúti, og staðið verður turkað við húsarhaldsspritti (70%).

**Reingeringarútgerð**

- Útgerð, ið spjaðir støv, skal ikki nýtast
- Útgerðin skal einans nýtast á teimum ávísu økinum á stovninum
- Dustsúgvarar skulu hava HEPA filtur fyri útblástrinum

**Reingeringarevni**

- Einans veikur alkaliskur lútur eigur at verða nýttur.
- Til vesikummur og vøsk kann verða neyðugt at nýta serstøk vaskievni.
- Til gólvklædning skal nýtast sápa við ella við ongum voksi.
- Reingerðarevni skulu ikki innihalda anga, haldi-  ella haldførisevnir

**Reinleikakrøv grundað á aktivitet, ið fara fram á teimum einstøku økinum**

I. Inn-og útslusingarøki fyri starvsfólk, børn og avvarandi:
   - Gólv og aðrar vatnrættar flatur verða vaskaðar hvønn dag.
   - Hillar og skáp, lampuskermar verða turkað/vaska so mikið ofta, at sjónligt dust ikki kemur fyri.

VÁGA KOMMUNA

II. Hvílirúm, setstovur fyri børn, pedagogar og hjálparfólk

- Gólv og aðrar vatnrættar flatur verða vaskaðar hvønn dag.
- Durahandtøk, kontaktir og annað, ið javnan verður nert við, verður turkað/sprittað hvønn dag

III. Skrivstovur, reingerðingarrúm og onnur rúm, har einans starvsfólk hava atgongd

- Gólvini verða vaskað hvønn dag.
- Vatnrættar flatur oman fyri gólv verða vaskaðar ella turkaðar við fuktaðum klúti, so at sjónligt dust ikki kemur fyri.
- Hillar og skáp, lampuskermar verða turkað/vaska so mikið ofta, at sjónligt dust ikki kemur fyri.
- Vindeygu og hurðar verða vaska so mikið ofta at sjónligt dálking og dust ikki kemur fyri.

IV. Vesi og røktarrúm

- Vesikummur, vøsk og spegl oman fyri vøskini verða vaskað hvønn dag, og hvørja ferð tey verða sjónliga dálkað.
- Spegl oman fyri vøskini verða vaskað hvønn dag.
- Vatnrættar flatur og loddrættar flatur í nánd av røktarlegu, vesi og vaskikummu verða vaskað hvønn dag og annars um tær verða sjónliga dálkaðar

V. Køkur og matarhøli

- Reingerðing av køki og køksútgerð verðurt gjørt reint sambært krøvunum, ið eru sett av Heilsufrøðisligu mynduleikunum

**Tilvísing** 1. Styring af infektionshygiejnen i sundhedssektoren – DS 24514-10: Krav til rengøring.

Samtykt á kommustýrisfundi 20. nov. 2013 at koma í gildi beinanvegin.

Vága kommuna

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

VÁGA KOMMUNA

# Reinførispolitikkur fyri Vága kommunu.

## Skrivstovur, fundarrúm, reingerðingarrúm og onnur rúm.

Gólvini verða vaskað einaferð um vikuna við mildum sápulúti. (sápuspønir,).

- Vatnrættar flatur oman fyri gólv (skriviborð og fundarborð) verða vaskaðar ella turkaðar við fuktaðum klúti, so at sjónligt dust ikki kemur fyri.
- Hillar, skáp, vindeygakarmar, lampuskermar verða turkað/vaska so mikið ofta, at sjónligt dust ikki kemur fyri.
- Vindeygu og hurðar verða vaska so mikið ofta at sjónligt dálking og dust ikki kemur fyri.

. Vesi

- Vesikummur, vøsk og spegl oman fyri vøskini verða vaskað **hvønn dag**, og **hvørja ferð** tey verða sjónliga dálkað.
- Vesikumma **skal** vaskast hvørja ferð hon er sjónliga dálkað.
- Spegl oman fyri vøskini verða vaskað hvønn dag.
- Vatnrættar flatur og loddrættar flatur, vesi og vaskikummu verða vaskað hvønn dag og annars um tær verða sjónliga dálkaðar

. Køkur og matarhøli

- Reingerðing av køki (borð, vask og kókiplátur) og køksútgerð verðurt gjørt reint hvønn dag.

Samtykt á kommunustýrisfund 20. nov 2013, at koma í gildi beinanvegin.

Vága kommuna

Rósa Samuelsen, borgarstjóri